

# LØGFRØÐINGUR TIL FØROYA BANKA

**Stjórnarumsitingin í Føroya Banka leitar eftir løgfrøðingi, ið er hugaður fyri at arbeiða við fjølbroyttum uppgávum innan virksemi hjá einum fíggingarstovni.**

**Arbeiðsøki**
Sum løgfrøðingur kemur tú at:

- Luttaka í verkætlanum sum serfrøðingur
- Fremja ráðgevandi innanhýsisuppgávur
- Fyrireika størri innanhýsismál fyri leiðsluna
- Arbeiða við lógarkarmum fyri peningastovnsvirksemið
- Arbeiða við rættarmálum

Herumframt kemur tú at veita ráðgeving og undirvísing til starvsfólk bankans eftir tørvi.

Tú kemur at arbeiða í einum toymi við dugnaligum og virkisfýsnum starvsfeløgum, og vænta vit, at tú saman við teimum vil stuðla uppundir, at vit røkka okkara handilsligu málsetningum sambært teim virðum – og innan tær lóggávur - ið eyðkenna virksemi okkara.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú:

- Hevur útbúgving sum cand.jur.
- Hevur fyrisitingarligar royndir, t.d., við málsviðgerð
- Dugir enskt á samráðingarstigi

Vit leggja dent á, at tú dugir væl at orða teg í skrift og talu, ert opin, ágrýtin og uppsøkjandi, og at tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt.

**Løn og setanarviðurskifti**
Verða avtalað sambært útbúgving og royndum umsøkjarans.

**Umsókn**
Send tína umsókn við CV til Føroya Banki, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn, att: Bjarki Mohr, ella á teldupost starvsfolk@foroyabanki.fo innan 20.oktober 2006.

**Meira kunning**
Hevur starvið tín áhuga? So kanst tú fáa meira at vita við at seta teg í samband við leiðaran fyri stjórnarumsitingina, Jean Djurhuus á tlf. 311350, teldupostur jean.djurhuus@foroyabanki.fo., ella Bjarka Mohr á tlf. 319937, teldupostur bjarki.mohr@foroyabanki.fo.

FØROYA BANKI
100 ár – yngri enn nakrantíð

REPROZ



# KT - VERKÆTLANARLEIÐARI TIL FØROYA BANKA

**Vit leita eftir royndum verkætlanarleiðara til kt-øki bankans, ið er hugaður at standa á odda fyri og leiða verkætlanir.**

**Arbeiðsøki**
Sum verkætlanarleiðari skalt tú:

- Luttaka í og leiða verkætlanarbólkar
- Gera kravfestingar og nærlýsa verkætlanir
- Gera ætlanir og veitanarlýsingar
- Fylgja upp og tryggja, at verkætlanir røkka ásettum málum
- Tryggja eina hóskandi kunning um verkætlanir í fyritøkuni

Vit leggja dent á høgt góðskustig, at evstamark og fíggjarætlanir halda, og at hesi ganga saman við skipaða skjalfesting. Tað er tín ábyrgd at tryggja framdrift í uppgávuloysnum ígjøgnum eitt jaligt og gevandi samstarv við aðrar verkætlanarluttakarar.

Herumframt kemur tú at nærlýsa viðkomandi virkisøkir og arbeiðsgongdir, ið hava týdning í verkætlanum.

Tú kemur at arbeiða í einum toymi við dugnaligum og virkisfýsnum starvsfeløgum, og vænta vit, at tú saman við teimum vil stuðla undir at røkka handilsligum málsetningum sambært virðum, ið eyðkenna virksemi okkara.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú:

- Hevur viðkomandi útbúgving
- Hevur royndir við kt-verkætlanarleiðslu
- Praktiskar royndir við menningarætlanum, kravfestingum og broytingarleiðslu
- Kunnleika til góðskustýring og váðastýring
- Hevur tekniskan førleika

Vit leggja dent á, at tú ert fyrikomandi, ágrýtin og uppsøkjandi, og at tú megnar at hugsa og arbeiða sjálvstøðugt.

**Løn og setanarviðurskifti**
Verða avtalað nærri, sambært útbúgving og royndum.

**Umsókn**
Send eina umsókn við CV til: Føroya Banki, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn, att: Bjarki Mohr, ella við teldupost til starvsfolk@foroyabanki.fo innan 20. oktober 2006.

**Meira kunning**
Hevur starvið tín áhuga? So kanst tú fáa meira at vita við at seta teg í samband við leiðaran fyri KT - økið, Inga Vestergaard, á tlf. 311350, teldupostur ingi.vestergaard@foroyabanki.fo., ella Bjarka Mohr á tlf. 319937, teldupostur bjarki.mohr@foroyabanki.fo.

FØROYA BANKI
100 ár – yngri enn nakrantíð

REPROZ